# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 15. august 2023 |
| Mál nr.: | 23/02889 |
| Málsviðgjørt: | |
| Ummælistíð: | 15. august til 5. september 2023 |
| Eftirkannað: | 24. juli 2023 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll**
(Nýggj vørunummur í toll- og vøruskránni og ávísar rættingar í toll og vøruskránni)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 49 frá 4. mai 2021, verður skjal 1 broytt sum ásett í skjali 1.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

**Skjal 1**

Í skjali 1 til løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 (Toll- og Vøruskráin) verða hesi vørunummur sett inn:

| Vørunummar | Tollur (%) | Tekstur |
|---|---|---|
| 28129010 | 5,50 | Svávul hexaflourid ($SF_6$) |
| 29034200 | 5,50 | Difluormethan (HFC-32) |
| 29034411 | 5,50 | Pentafluorethan (HFC-125) |
| 29034412 | 5,50 | 1,1,2-trifluorethan (HFC-143) |
| 29034413 | 5,50 | 1,1,1-trifluorethan (HFC-143a) |
| 29034512 | 5,50 | 1,1,1,2-tetrafluorethan (HFC-134a) |
| 38276110 | 6,50 | R404A indeholdende 52% 1,1,1-trifluorethan (HFC-143a), 44% pentafluorethan (HFC-125) og 4% 1,1,1,2-tetrafluorethan (HFC-134a) |
| 38276140 | 6,50 | R507A indeholdende 50% pentafluorethan (HFC-125) og 50% 1,1,1-trifluorethan (HFC-143a) |
| 38276220 | 6,50 | R422D indeholdende 65,1% pentafluorethan (HFC-125), 31,5% 1,1,1,2-tetrafluorethan (HFC-134a) og 3,4% isobutan |
| 38276310 | 6,50 | R410A indeholdende 50% pentafluorethan (HFC-125) og 50% difluormethan (HFC-32) |
| 38276410 | 6,50 | R407C indeholdende 52% 1,1,1,2-tetrafluorethan (HFC-134a), 25% pentafluorethan (HFC-125) og 23% difluormethan (HFC-32) |
| 38276420 | 6,50 | R407F indeholdende 40% 1,1,1,2-tetrafluorethan (HFC-134a), 30% difluormethan (HFC-32) og 30% pentafluorethan (HFC-125) |
| 38276520 | 6,50 | R449A indeholdende 25,7% 1,1,1,2-tetrafluorethan (HFC-134a), 25,3% 2,3,3,3-tetrafluorpropen (HFC-1234yf), 24,7% pentafluorethan (HFC-125) og 24,3% difluormethan (HFC-32) |

Í skjali 1 til løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 (Toll- og Vøruskráin) verður hetta vørunummar strikað:

| Vørunummar | Tollur (%) | Tekstur |
|---|---|---|
| 22021000 | 9,60 | Vand, sødet og aromatiseret, tilsat kulsyre |

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Toll- og vøruskráin er uppslagsverk, ið vísir toll og annað avgjald á vøru, ið keypt verður úr útlondum. Í toll- og vøruskránni eru tollsatsir og tarifering ásett. Toll- og vøruskráin er ásett sum skjal 1 í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll (tolllógin). Við uppskotinum verða nýggj vørunummur stovnað fyri sonevnd f-gass í sambandi við at áseta avgjøld á innflutning av f-gassum.

Harafturat verður við lógaruppskotinum eitt vørunummar strikað í toll- og vøruskránni.

Lógaruppskotið fylgir altjóða sáttmála um at nýta nomenklatur tollsamvinnuráðsins "Harmonized Commodity Description and Coding System" sum toll- og vøruskrá.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lóggáva er løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 49 frá 4. mai 2021. Toll- og vøruskráin er ásett sum skjal 1 í tí lógini. Í toll-og vøruskránni eru tollsatsir og tarifering ásett. Í galdandi toll- og vøruskrá eru ikki ásett vørunummur ella tollur fyri f-gass. Tí er neyðugt at stovna nýggj vørunummur í sambandi við f-gass.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at seta inn í toll- og vøruskránna nýggj vørunummur í sambandi við f-gass, sum verða brúkt sum kølievni í ídnaði.

Harafturat er endamálið at strika eitt vørunummar í toll- og vøruskránni (vørunummar 22021000). Hetta vørunummarið, sum verður strikað, er sambært TAKS óneyðugt og óheppið framhaldandi at hava í toll- og vøruskránni, tí onnur vørunummur eru til tolling av viðkomandi vørum.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum verða nýggj vørunummur sett inn í toll- og vøruskránna í sambandi við f-gass, sum verða brúkt í køliskipanum í Føroyum. Harafturat verður eitt vørunummar í toll- og vøruskránni strikað. Hetta vørunummarið, sum verður strikað, er sambært TAKS óneyðugt og óheppið framhaldandi at hava í toll- og vøruskránni.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá [].

Harafturat hevur løgtingslógaruppskotið verið til ummælis hjá [].

Lógaruppskotið hevur eisini verið til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Løgmálaráðnum í tíðarskeiðinum 7. august 2023 til 25. august 2023.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið verður ikki mett at hava fíggjarligar avleiðingar við sær fyri landið.

Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar við sær fyri kommunurnar.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið fer at lætta um umsitingina av tolløkinum fyri TAKS. Uppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar við sær fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar við sær fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki við sær serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Føroyska toll- og vøruskráin er gjørd og uppbygd eftir leisti, sum er ásettur av altjóða felagsskapinum World Customs Organization (WCO), sum varð stovnaður í 1952. Felagsskapurin WCO er fyri sjálvstøðugar statir. Danmark gjørdist limur av WCO við stovnan og er limur í WCO vegna kongsríkið Danmark. Tolldeildin á TAKS fylgir leistum, mannagongdum og leiðreglum, sum verða ásettar av WCO á tolløkinum, undir hesum ásetingum innan toll- og vøruskránna.

Føroyar hava sambært sáttmála frá 1. februar 1992, sum seinast er broyttur í 1997, við Evropiska Samveldið, samtykt at nýta nomenklatur tollsamvinnuraðsins “Harmonized Commodity Description and Coding System” sum toll- og vøruskrá. Lógaruppskotið fylgir altjóða sáttmála um at nýta nomenklatur tollsamvinnuráðsins “Harmonized Commodity Description and Coding System” sum toll- og vøruskrá.

Aðrir millumtjóðasáttmálar eru ikki á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Mett verður, at lógaruppskotið samsvarar við *Hoyvíkssáttmálan* (Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sambært anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sambært bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

### 2.9. Markaforðingar

Ongar kendar markaforðingareru á økinum. Mett verður ikki, at lógaruppskotið fer at elva til markaforðingar.

### 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

### 2.11. Skattir og avgjøld

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir. Við tað at hesi 13 nýggju vørunummurini verða stovnað til f-gassini eftir altjóða leisti og hesi f-gassini altjóða hava álagdan gatt-toll á 5,5 og 6,5% verður hetta avgjaldið eisini galdandi í Føroyum, eins og sæst í skjali 1 til hesa lóg.

### 2.12. Gjøld

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

### 2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?

Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

### 2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

### 2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

### 2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

### 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Í § 1 verður ásett, at broytingarnar, sum eru lýstar í skjali 1, verða gjørdar í skjali 1 til tolllógina. Skjal 1 í tolllógini er toll- og vøruskráin.

Broytingarnar merkja, at 13 nýggj vørunummur verða sett inn í toll- og vøruskránna og eitt vørunummar verður strikað. Tey 13 vørunummurini, sum verða sett inn, eru til tey mest vanligu f-gassini, sum verða brúkt í Føroyum.

Vørunummar 22021000 verður strikað úr toll- og vøruksránni í skjali 1 til tolllógina sambært tilmæli frá TAKS. Tilmælið er grundað á, at í Føroyum eru lýst tvey serføroysk vørunummur fyri sodavatn. Tey eru:

- 22021018, Vand, herunder mineralvand og vand tilsat kulsyre, tilsat andet sødmiddel end sukker eller aromatiseret

- 22021019, Vand, herunder meneralvand og vand tilsat kulsyre, tilsat sukker eller aromatiseret

Tá ið sodavatn verður innflutt, skal tað tollast undir eitt av omanfyrinevndu vørunummurum. Á báðum vørunummurum er avgjald á 2 kr. pr. litur lýst (í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi).

Tá tvey serføroysk vørunummur eru lýst fyri sodavatn, er óneyðugt at hava tað yvirskipaða vørunummarið fyri sodavatn, sum er 22021000 “vand, sødet og aromatiseret, tilsat kulsyre”. Viðmerkjast skal eisini, at einki avgjald er lýst á vørunummar 22021000 (í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi). Tí er óheppið, um tað verður standandi.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 15. august 2023.

**Ruth Vang**
landsstýriskvinna

/ Bjarni A. Bjarnason